## Opel Insignia



Eftir at Opel Omega bleiv tikin av skránni í 2003, er ikki heilt víst hvussu tað verður við stórum Opel-bilum í nærmastu framtíð. Men hesin Insignia Concept Car, ið er bygdur yvir ein Cadillac plattform, er møguliga eitt boð uppá ein avloysara fyri Omega

*Kelda: bilpriser.dk*

## Ókeypis bilar frá GM



Í 56 dagar geva General Motors í USA 1000 spildurnýggjar bilar ókeypis til tey, sum fara inn til ein GM bilhandlara og trýsta á ein knøtt á eini lottarímaskinu. Tey síggja tá beinanvegin, um tey hava vunnið. Endamálið er at vekja áhugan hjá amerikanarum fyri sínum egnu bilum

*Kelda: DR Nyheder Online - Indland*

## Væl nøgd við CR-V



Amerikanski kanningarstovnurin, J.D. Power, gjørdi herfyri eina kanning av hvussu nøgdir 52.000 bileigarar vóru við sínar nýggju bilar. Kanningin vísti at Honda CR-V lá á odda viðvíkjandi kvaliteti og kundanøgdsemi

*Kelda: bilpriser.dk*



*Nakað soleiðis kemur avloysarin hjá Lexus GS at síggja út, tá hann kemur á marknaðin í 2005. Stórt Lexus-logo í kølaragittaranum og smart design*

Lexus LF-S:

# Nýggjur Lexus í 2005

**Tað sær út til at bilarnir í framtíðini fara at broytast sera nógv í allar mátar, ikki minst hvat designinum viðvíkur. Her er konseptbilurin Lexus LF-S, ið eftir ætlan skal koma á marknaðin í 2005 sum avloysari fyri Lexus GS**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Lexus er luksusbilmerki hjá Toyota. Núverandi Lexus GS 300 og GS 430 verða í 2005 skiftir út við ein heilt nýggjan bil, sum líkist konseptbilinum Lexus LF-S. Bilurin bleiv sýndur fram á Tokyo Motorshow seinasta heyst, og har bleiv hann væl móttikin av áskoðarunum.

LF-S er størri enn Lexus GS, og bilurin á framsýningini hevði hybrid motor, sum teir koma at satsa nógv upp á í framtíðini eftir at Toyota Prius er vorðin ein succes.

Tá bilurin endaliga kemur á marknaðin í 2005 verða ein 3,3 litur V6 motorur við 235 hk og seinni kemur so ein V8 motorur við 360 hk.

Lexus hava rættuliga sligið ígjøgnum í USA, har teir gera lívið súrt hjá evropeisku og ameikansku luksusbilunum, men í Evropa ráða evropeisku luksusbilmerkini.



*Baklyktirnar sita høgt, og bilurin, sum hevur fýra hurðar, minnir um ein coupé*

# Ferrari 612 Scagliette

**Á Detroit Motorshow í januar verður avloysarin hjá Ferrari 456 GT sýndur fram. Ferrari 612 Scagliette er gjørdur úr aluminium og bilurin, sum hevur V12 motor við 540 hk, kostar umleið 4,6 milliónir krónur á donskum nummarplátum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Á myndini her sæst at Peugeot 407 og Ferrari 612 hava sama italska designara, Pininfarina, men bilarnir kunnu ikki heilt samanlíknast. Ferrari 612 Scaglietti er ein 2+2 GT, sum sameinir komfort og sport í einum bili við heilt ótrúliga góðum koyrieginleikum. Talan er um eina koyrimaskinu, sum koyrir frá 0-100 km/t upp á 4,2 sekund, og toppferðin er 315 km/t. Motorurin er ein 5,7 litur V12 við 540 hk.





# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**FORD FOCUS STATIONCAR 1.8 TURBO DIESEL**
Árg 16.maj 2002, Km 41.000. Sum nýggjur: Centrallás- El.Rútar-Hita í forrúti - Hita í Forsetrum - Radio v/bandsp. V.m. Bert 1. ár og 5. mánaðir. Seldur vegna keyp av 7. pers. bili. Kr. 175.000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg Mar-97, Km 150.000. Fjarstýrt centrallás-El-rútar-El-spegl - Spoylara aftan- Alufelgur- v.m. Tilboð uttan bil í býti kr. 52.000. Kr. 66.000.



**ROVER 620 SI**
Árg Jun-99, Km 81.000. Sera vælhildin: Aircondition-Alufelgur-Fjarstýrt centrallás- El-rútar-El-spegl v/hita. C.D. Anlegg- Sleipikrók v.m. Kr. 158.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL STATIONCAR.**
Árg 08.Juni 95, Km 138.400. Centrallás - El-rútar - El-spegl - Radio v/bandspælara og CD Boks. Kr. 78.000.



**TOYOTA CARINA 1.8 GLX SEDAN**
Árg Dec. 1997, Km 111.000. Aircondition - Alufelgur- Eyka Hjólsett- El.rútar fr. -Radio v. C.D. - centrallýs v.m. Sera vælhildin. Kr. 96.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AUTOMATIC**
Árg 06 Sept. 1995, Km 96.000. Sera vælhildin: Automatisk gear-Centrallás- El-rútar- El-spegl-Radio v/bandspælara. Kr. 78.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL, AUTOMATIC**
Árg 10. Apríl 96, Km 70.000. Sera vælhildin: Automatisk gear - C.D.Anlegg - Centrallás - El. Rútar - El. Spegl v.m. Kr. 85.000.



**PEUGEOT EXPERT 2.0 HDI 8.PERS—NAR**
Árg Jan-03, Km 14.900. Selist vegna keyp av 4. hjólstrekkjara. Sum nýggjur: Alufelgur- Eyka vetrarsett- tónaðar rútar- El-rútar-El-spegl-Fj. stýrt centrallýs-C.D.Anlegg- Sleipikrók v.m. Kr. 250.000.



**TOYOTA LANDCRUISER DIESEL**
Árg Maj 1986, Km 136.000. Innregistreraður sum persónvognur. Leverast nýsýnaður. Kr. 28.000.



**HONDA CIVIC**
Árg Sept .2001, Km 20.700. Aircondition - El.rútar - El.spegl v.hita -Radio - Fjarstýrt centrallás v.m. Sum nýggjur. Tilboð kr. 135.000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg 17 Jan. 1997, Km 49.000. Fjarstýrt centrallýs-El-rútar-El-spegl- Radio v.bandspælara eyka tectylviðgjørdur. Selist vegna flyting til Danmark. Kr. 58.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL**
Árg 03 Marts 1993, Km 82.000. Sera vælhildin: El-sóltak- Centrallás- El.Rútar-El.Spegl-Radio v/bandspælara -Eyka hjólsett v.píkum. Kr. 67.000.

P/f D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600 - Fax 310650**



**CITRO'N XSARA 2,0 HDI DIESEL STATIONCAR**
Árg apr.2001, Km 19.000. Sera væl hildin. Kr. 130.000.
Tel. 373874 ella 228591



Bummgjald:

# Hvat søgdu Vágafólk ja til?

*William Smith*

Nú undirsjóvartunnilin hevur haft 1 ára føðingardag, kann staðfestast, at henda íløga, var ein røtt íløga, lat ongan iva verða um tað. Frá tí, at nærum bert vágafólk gjørdu brúk av gomlu skipanini at koma um sundi vid Samferðsluskipunum, 375 bilar pr. dag, so er ferðslan nú vaksin upp í 880 bilar pr. dag.

Tað ferðast 450 fólk um flogvøllin um dagin, og bussarnir hjá strandferðsluni koyra so gott sum tómir millum Havnina og Flogvøllin. Soleiðis var ikki, tá ferjurnar sigldu. Tá stóðu fólk sum sild í tunnu í hvørjum bussi, ið fór um sundið, og vísir hetta, at teir nú koyra tómir, at fólk hava gjørt av at brúka egnu bilar sínar fyri at koma á flogvøllin ídag.

375 + 450 = 825 Bilar pr. dag, og passar hettar sera væl við tað ferðslu, sum er í dag.

Tíverri framgongur tað av hesum tølum, at tey, sum róptu harðast um at fáa fast samband um Vestmannasund, ikki gera nýtslu av tunnlinum - meira enn tað sama sum tá ið ferjurnar sigldu um sundið, 375 bilar pr dag.

P/F Vágatunnilin hevur, saman við landinum, gjøgnumført hetta pragtfulla bygningsverk, men nú sæst, at tað verður ikki brúkt til fulnar, var tað nú meiningin?

Orsøkin er sera einføld, fólk hava ikki ráð at nýta hetta stóra bygningsverk!

Vágafólk, øll sum eitt, søgdu ja til at gjalda bummpengar fyri at fáa hetta megnarverk gjøgnumført, og tað frøddi mangan Føroying, at Vágafólk góðtóku hetta. Tó skulu vit minnast til, at hetta var í teimum ringu tíðunum, einaferð í 80-90´unum. Lat tað fara, nú er tunnilin komin, og vágafólkum varð álagt at gjalda sín part. Vágafólk høvdu ongar trupulleikar av hesum, vit skulu nokk gjalda.

Tunnilin bleiv mettur at kosta 240 milliónir krónur at byggja . Landið átók sær at rinda 2/3 av hesum, 160 mill, og bummgjald skuldi so fíggja restina av kostnaðinum, 80 mill., svarandi til 1/3. Hetta skuldi gjaldast yvir eitt 15 ára tíðarskeið.

### 80 mill = 375 mill.!?

Tað sum síðani er hent er, at nú eru 80 mill. ikki 80 mill. longur, nei nú skulu 375 millónir(tað sama sum Norðoyartunnilin er mettur at kosta allur sum hann er!) inn við bummin á Vágalandinum yvir 15 ár! 25 milliónir skulu inn um ári, sigur Stjórin í "P/F Vágatunnilin" nú. Hetta hevur ført við sær, at tað kostar 180 kr. (186 kr tá gjaldast skal í banka) at koyra ígjøgnum tunnilin, og sigur tað seg sjálvt, at hetta eru alt ov nógvir pengar hjá tí vanliga føroyinginum at gjalda. Sjálvt við einum 40-túra kubba, sum jú gevur lægsta prís, so skal ein, sum nýtir hesar 5 km av vegi til arbeiðis hvønn dag, av við umleið 20.000.- kr. í kubba-gjaldi pr/ ár.

Tí brúka Vágafólk ikki tunnilin meira enn tað sama, sum tey gjørdu, tá gamla farleiðin førdi tey um sundi, tað letur seg ikki gera!

### 13 ár og 11 mánaðir:

At 880 fólk/bilar gera brúk av tunnilinum, er bert at frøast um. Men ikki kann sigast, at tunnilin sum so hevur haft tað stóru positivu ávirkan á eitt nú vinnulívi her vesturi. Nei, tað er ov dýrt! Men Vágafólk eru stolt, tey tiga (undirritaði er havnamaður) og tey skulu nokk gjalda sín part - men tey flestu hava nú gjørt av at bíða í 13 ár og 11 mánaðir. Tí TÁ verður tunnilin handaður landinum og so verður frítt at nýta hetta pragtfulla bygningsverk. Og TÁ kemur tað eisini til sín fulla rætt. Og TÁ fer Vágoyggin eisini at fáa tann ágóða, sum tey høvdu væntað fyri einum góðum ári síðani, men av tí, at eitt alment partafelag varð sett at stýra øllum hesum projektinum, ja so mugu vit bert ásanna, at tað verður ikki fyrr enn um 13 ár og 11 mánaðir, at tunnilin opnar.

### Hví 180 kr:

Orsøkin skal finnast í hesum, at tað sita 10 fólk í Tórshavn í leigaðum hølum, og umsita hetta showi. Ein millión er sett av til kavarudding av vegastrekkinum vid tunnilsmunnan her vesturi, og so ikki at gloyma Ansni (hví ikki Vága Vaktarhald), sum nú í meira enn 1 ár hevur sitið vágamegin í einum skúri og gløtt at einari automat, sum bert skilur norskt.

Tunnilin verður í dag bert útnyttaður ein brøkpart av tí, hann var ætlaður til. Landi hevur brúkt 160 milliónir kr, og tad einasta veruliga produktið, vit skattgjaldarar hava fingið fyri hesar 160 milliónirnar, er at bussarnir hjá SL koyra tómir millum Havnina og flogvøllin.

Hvat er galið við Landsverkfrøðinginum. Lat hann sum skjótast takað við, og fá so lukka fyri tí heita vatninum hjá P/f Vágatunnilinum. Hetta P/f umsitur EIN tunnil og LV 15. Eisini er vert at minnast til, at landsverkfrøðingurin kemur ikki at lasta tunnilin vid nøkrum. Hann situr jú í nevndini hjá P/f Vágatunnilinum sum er, so hann kann bara skifta sess vid tað runda borði.

Tað er eitt krav, at tit politikkarar takað um endan, og syrgja fyri at seta tykkum inn í hesi viðurskiftið og opna tunnilin.

### Hypotesa:

Vágafólk søgdu ja til at gjalda 80 mill(1/3 av láninum) inn sum bumgjald yvir 15 ár. Hetta gevur 5,3 milliónir um ári. Dividera hetta talið upp í nýtslutalið ígjøgnum tunnilin ídag, 880 bilar pr dag,(440 gjalda) ja so hevði tad kosta umleið 30 krónur fyri hvørt akfarið at farið ígjøgnum tunnilin, og rokni eg við at hetta var tað, Vágafólk søgdu ja til, tá ið tey øll vælsignaðu bummgjaldi.